# LISTASAVN FØROYA

## Ársfrágreiðing og roknskapur

## 2006

Listasavn Føroya - Gundadalsvegi 1 - Postsmogu 1141 - FO 110 Tórshavn - Føroyar
Telefon +298 313579 - Fax + 298 316679 - T-postur: info @ art.fo - www.art.fo

mai – 07

Innihaldsyvirlit

**Ársfrágreiðing 2006** ... 3
Varðveitsla ... 4
Tiltøk ... 4
Gransking ... 4
Miðling ... 4
Fasta framsýningin ... 5
Skiftandi framsýningar ... 5
Framsýningar uttanlands ... 5
Grunnur til keyp av list ... 5
Útbygging av Listaskálanum ... 5
Myndlistin í Føroya Banka ... 6
Stuðul og fíggjarvánir ... 6
Mannagongd og reglugerð ... 6
**Virkisgrundarlag og endamál** ... 7
Navnið á savninum ... 7
Savnsbygnaður ... 7
**Endamálið hjá Listasavni Føroya** ... 7
**Samstarvsavtalur** ... 7
**Innsavning, keyp og gávur** ... 8
**Útlánt listaverk til almennu stovnarnar:** ... 9
**Varðveiting** ... 10
**Upplatingartíðir – Opening hours** ... 11
**Framsýningar í Listasavni Føroya 2006** ... 11
Mikines 100 ár. ... 11
Rethinking Nordic Colonialism: ... 11
Summarframsýningin. ... 12
Ólavsøkuframsýningin. Skipað av Listafelagi Føroya. ... 12
Endurnýggjað íslendsk málningalist: ... 12
Jón Laxdal (Aukureyri, Iceland). Serframsýning ... 12
Provincialists: ... 12
**Vitjandi, rundvísingar og annað kunnandi virksemi** ... 13
**Bygnaður, leiðsla og starvsfólk** ... 14
**Fígging og roknskapur** ... 15
Samanseting av almenna og sjálvseigandi ársroknskapunum ... 20

# Ársfrágreiðing 2006

Árið 2006 hevur verið sera hendingaríkt. Vit hava havt átta forvitnisligar framsýningar:

Mikines 100 ár, ið var sera væl vitjað. Framsýningin var tematiskt bygd upp við deyðs-, grindadráps- og landslagsmyndum, umframt nøkrum átrúnaðarligum myndum eisini ein røð av andlitsmyndum.

Várframsýningin, har 17 listafólk sýndu fram. Ole Wich og Petur Pólsson høvdu eina framløgu, ið nógv vitjandi sóu.

Rethinking Nordic Colonialism, ið var ein altjóða og fjølbroytt listaframsýning við átta sera ymiskum listafólkum. NIFCA skipaði fyri framsýningini, og hon var kuraterað av Fredrikke Hansen og Tone Nielsen. Henda ferðaframsýning hevur verið víða um í Norðurlondum. Ein bók var at fáa ókeypis í sambandi við framsýningina.

Summarframsýningin, har verk eftir Mikines, Frimod Joensen, Janus Kamban og Thomas Arge, ið ikki hava verið at sæð í longri tíð, vórðu sýnd fram.

Ólavsøkuframsýningin, har 19 listafólk sýndu fram.

Endurnýggjað íslendsk málningalist, har listafólk við altjóða viðurkenning sýndu fram. Tey eru Odd Nerdrum, Karólina Lárusdóttir, Stefán Boulter, Gerog Guðni Hauksson og Kristin Gunnlaugsdóttir, ið vístu fram tað fremsta innan íslendska málningalist í dag. Bókaútgáva, skrivað av Eiriki Thorlákssyni, varð útgivin í hesum sambandi.

Jón Laxdal, ið hevði serframsýning við pappírsmyndum og -lutum. Hetta var ógvuliga øðrvísin framsýning, men forvitnislig. Framsýningin er síðani víst í Berlin og aðrastaðni.

The Provincialists, ið var ein ferðaframsýning, sum hevur ferðast í Norðurlondum og USA. Í sambandi við framsýningina varð hildið eitt tveir dagar seminar á Fróðskaparsetrinum.

Framsýningarnar hava verið í so nógvar í tali um árið, og tí hanga tær í so stutt, og tessvegna hava vit valt at minka um talið á framsýningum, fyri at tær kunnu framsýnast longri. Hetta samsvarar eisini betur við arbeiðsorkuna á savninum.

Fyrireikingarnar til stóru framsýningina um Ruth Smith og bókaútgávan byrjaðu á sumri 2006. Vit byrjaðu við at lýsa eftir verkum hjá Ruth Smith, soleiðis at vit kundu skrásetað tey í skipan okkara. Tað er eitt av endamálum Listasavnsins sambært viðtøkunum, og hetta er fyrstu ferð, at tað verður gjørt. Vit skrásettu og avmyndaðu yvir 200 verk á øðrum hond. Somuleiðis fingu vit loyvi at nýta alt skrivligt tilfar og myndir frá arvingunum, Leif og Louis Nielsen. Bókina um Ruth Smith, ið er 300 blaðsíður við uml. 170 myndum, hevur Dagmar Warming, listfrøðingur skrivað, og bókin er á føroyskum, donskum og enskum. Henda framsýning verður eisini sýnd fram í Museet for Religiøs Kunst í Lemvig á heysti 2007. Framsýningin og bókin hava vakt miklan ans í nógvum tíðarritum og bløðum í Danmark og vóru m.a. umrødd á permuni til mentanartáttin í Jyllands-Posten.

Listasavnið fekk høvi til at ogna sær tvey verk av Mikinesi, *Sjálvsmynd* 1933 og *Faðir mín* 1934. Keypið er stuðlað av Ny Carlsbergfonden, Beckett-fonden og Augustinusfonden. Vit meta, at hesi verk, ið hava

ómetaligt virði, hoyra saman við myndini, *Móðir mín* 1934, ið vit frammanundan eiga. Umframt hesi bæði verk var okkum í boði at keypa verk eftir Thomas Arge, *Ross og fólk* 1970. Myndevnið í hesum listaverki er væl øðrvísi í mun til onnur verk hjá listamálaranum, ið vit eiga. Annars hava vit í ár keypt 21 onnur verk. Tað er neyðugt framhaldandi at ogna savninum góða føroyska list, soleiðis at savn okkara lýsir og umboðar tað føroysku listasøguna so væl sum gjørligt. Orkan hjá Listasavni Føroya at keypa list er avmarkað, og tí er vón okkara at fáa eina størri játtan, soleiðis at vit røkka og fullfíggja endamáli okkara, at lýsa føroyska listasøgu til fulnar.

## Varðveitsla

Í ár hava vit konserverað 21 listaverk fyri kr. 378.000. Vit hava gjørt eina ætlan fyri konserveringar, ið framhaldandi verða gjørdar, sum ráðini eru til tað.

## Tiltøk

Í sambandi við Mikines-framsýningina varð skipað fyri serligum kvøldi 23. februar, ið var 100-ára føðingardagur Mikinesar. Eini 350 fólk møttu upp at hoyra Aðalsteinn Ingólfsson, ið tá var í holt við at skriva nýggju Mikines-bókina, greiða frá tilgongdini og at hoyra Kára Mikines greiða frá um pápa sín. Harafturat var tónleikur at hoyra og matur at fáa. Nýggja bókin um Mikines varð løgd fram á Listasavninum í novembur, og tá vóru somuleiðis eini 350 fólk til staðar.

Í sambandi við framsýningina Rethinking Nordic Colonialism vórðu tiltøk og fyrilestrar hildin í Listaskálanum og Norðurlandahúsinum. Listafólkini úr teimum ymisku londunum vóru til staðar. Á heysti varð síðan ein DVD-fløgu givin út í sambandi við framsýningina og tiltøkini, ið fólk kundu ognað sær ókeypis.

Í sambandi við framsýningina The Provincialists vórðu fyrilestrar hildnir á Fróðskaparsetrinum um evnið "provinsialismu". Fyrilestrarhaldararnir vóru úr øllum norðurlondum, eisini úr Føroyum.

Annars vórðu nógvar konsertir og onnur áhugaverd tiltøk hildin – herundir teir ungu evnaríku tónleikararnir, ið kappaðust um at sleppa út í heim at spæla til ymsar størri kappingar.

## Gransking

Vit hava sett okkum fyri at fáa føroyska list dokumenteraða við m.a. skráseting av list og bókaútgávum, sum partur av granskingini, so at hetta tilfar er tøkt hjá granskarum. Eisini fara vit framhaldandi at skráseta list á øðrum hondum í sambandi við komandi framsýningar.

## Miðling

Arbeitt hevur verið við at skriva stuttar ævisøgur á føroyskum, donskum og enskum um øll listafólk, ið eru umboðað á savninum. Hetta arbeiðið verður eftir ætlan liðugt á heysti 2007. Harumframt verður arbeitt við at gera tilfar til skúlabørn og ung.

## Fasta framsýningin

Framsýningin er soleiðis skipað, at stórt sæð øll tann føroyska listasøgan er umboðað. Stórur partur av upphongdu verkunum eru nýliga umvæld ella nýliga keypt. Á skeltunum stendur, hvørji verk eru nýliga umvæld ella keypt, fyri at gera vitjandi varug við virksemi á Listasavninum.

## Skiftandi framsýningar

Nú vit hava fingið góðkenning at hýsa altjóða list, eitt nú Edvard Munch, vísir tað seg ikki at vera nakar trupulleiki hjá okkum at fáa altjóða viðurkend listafólk at sýna fram á savninum, eitt nú Kjell Nupen, Odd Nerdrum og Alechinsky. Tó eru slíkar framsýningar sera kostnaðarmiklar, hvat frakt og trygging viðvíkja, og kann tað verða okkum ein forðing í ávísum førum.

## Framsýningar uttanlands

Vit hava arbeitt við at fáa føroyskar framsýningar uttanlands, og sær hetta út til at eydnast. Møguliga verður ein stór føroysk listaframsýning í Evropa í 2008.

## Grunnur til keyp av list

Framhaldandi verður arbeitt við at fáa sett á stovn ein grunn undir Listasavninum til keyp av list. Fundur hevur verið við Mentamálaráðið um hetta málið. Vónandi spyrst okkurt burtur úr hesum máli á heysti 2007.

## Útbygging av Listaskálanum

Tá ið fyrireikingar til útbyggjan av savnsbygninginum byrjaði, kom til sjóndar, at Listasavn Føroya ikki var skrásettur eigari av savnsbygninginum, men í staðin stóð Listafelag Føroya sum eigari. Sostatt stóð Listafelag Føroya sum eigari av allari ognini á matriklinum hjá Listasavninum. Leiðslan á savninum tá gjørdi einki fyri at kanna ella rætta mistakið, og tískil hevur henda støða staðið við líka til 2006. Tí var heitt á nevndina í Listafelag Føroya nú loksins – eins og ætlað var upprunaliga – at avhenda ognina til Listasavn Føroya. Ognin var avhendað við skeyti til Listasavn Føroya 27. september 2006, sostatt kundi fyrireikingararbeiðið byrjað.

Umstøðurnar á Listasavninum, bæði til framsýningar, pakking og goymslu, eru ikki nøktandi í dag, og tí verður arbeitt við at fyrireika eina útbygging, soleiðis at vit fáa størri pláss.
Av tí at Listaskálin liggur í skógfriðingarøki, er neyðugt at fáa loyvi frá skógfriðingarnevndini, og vit eru farnir í samráðingar um neyðug loyvir til hesa útbygging.

## Myndlistin í Føroya Banka

Nú Føroya Banki skuldi einskiljast, heittu vit í skrivi frá 27.02.2007 á Fíggingargrunnin frá 1992, Føroya Banka, landsstyrismannin í mentamálum, Jógvan á Lakjuni, landsstýrismannin í fíggjarmálum, Bárð Nielsen, løgmann, Jóannes Ejdesgaard og Føroya Løgting, at tey uml. 1000 listaverkini ikki verða einskild saman við bankanum, men í staðin latin Listasavni Føroya.

Í løtuni er áheitan okkara gingin á møti, soleiðis at listaverkini fram til 1994, tá bankarnir vórðu lagdir saman, verða keypt av Mentamálaráðnum og skulu umsitast av Listasavni Føroya. Hesi listaverk hava stóran týdning fyri Listasavnið, soleiðis at okkara savn verður meira fullfíggjað.

## Stuðul og fíggjarvánir

Stuðulin frá myndugleikunum, grunnum og feløgum hevur stóran týdning fyri virksemið hjá Listasavninum, og tað hevur gjørt tað møguligt at fremja tiltøk, sum annars ikki vórðu framd.

Í hesum sambandi takkar Listasavnið Mentamálaráðnum, Tórshavnar Kommunu, Listafelagi Føroya, Augustinusfonden, Ny Carlsbergfonden, Beckett-fonden og Mentanargrunni Landsins.

## Mannagongd og reglugerð

Mannagongd fyri savnið er samtykt av stýrinum, og somuleiðis er reglugerðin fyri stýrið eisini samtykt.

# Virkisgrundarlag og endamál

## Navnið á savninum

LISTASAVN FØROYA

Adressa, telefonnummar o.t.
Gundadalsvegur 9, Postboks 1141, FO 110 Tórshavn
Tlf.: +298 313579. Fax: +298 316679
E-mail: info@art.fo
Heimasíða: www.art.fo

## Savnsbygnaður

Listasavn Føroya er sjálvsognarstovnur, sum er stovnaður av Listafelagi Føroya og Føroya Listasavni í 1989, sum fevnir um framsýningarhúsið "Listaskálin", aðrar fastar ognir og savnið við føroyskari list.

# Endamálið hjá Listasavni Føroya

- at keypa og á annan hátt fáa til vegar savn við listaverkum, undir hesum mynd- og gagnlist og at skráseta og varðveita hetta savnið.
- at sýna fram føroyska myndlist við fastari framsýning í Listaskálanum og at skipa fyri skiftandi framsýningum av føroyskari og útlendskari list í Føroyum og uttanlands.
- at útvega yvirlit yvir føroyska list á øðrum hondum.
- at fáa til vegar bókasavn, sum lýsir føroyska list og menning hennara.
- at veita skúlum, feløgum og øðrum vegleiðing og hjálp at lýsa føroyska list.
- at virka fyri, at stovnurin fjølgar um virkismøguleikarnar hjá skapandi listini.
- Listasavn Føroya kann lata almennum stovnum o.t. listaverk í varðveitslu við treytum, sum stýrið ásetur.

# Samstarvsavtalur

Listasavnið hevur eitt sera neyvt samstarv við Listafelag Føroya, sum m.a. er stuðulsfelag hjá savninum, og sum á hvørjum ári fyrireikar Ólavsøkuframsýningina. Listasavnið hevur samstarv við Føroysk Myndlistafólk, sum m.a. fyrireika ta árligu "Várframsýningina".

Savnið samstarvar við Fælleskonserveringen (Vest) í Århus, tá tørvur er á konservering.

Avtalað er gjørd við Føroya Landsbókasavn um at skráseta og røkja listabókasavnið á Listasavninum.

# Innsavning, keyp og gávur

Keypt, givin og latin í varðveitslu

| Inv. nr.: | **Keypt í árinum:** Listafólk: | Prísur: |
|---|---|---|
| 955 | Øssur Johannesen – Fullmáni | 5.000 |
| 1131 | Jógvan Asbjørn Skaale – Kvinna | 4.500 |
| 2105 | Eyðun av Reyni – Stormdag | 25.200 |
| 1136 | Astri Luihn – The Quest of the Dragon Slayer | 36.000 |
| 1135 | Jóna Rasmussen – Dialog A og B | 7.200 |
| 1139 | Arnold Vegghamar – Klippevæg | 10.800 |
| 1141 | Arnold Vegghamar – Østvig | 10.800 |
| 1140 | Arnold Vegghamar – Østvig | 9.900 |
| 1138 | Amariel Norðoy – Fiskerbørn | 30.600 |
| 1132 | Sigrun Gunnarsdóttir – Søndagsfrakken | 6.750 |
| 1133 | Sigrun Gunnarsdóttir – Søndagsfrakken | 7.200 |
| 1134 | Sigrun Gunnarsdóttir – Søndagsfrakken | 6.750 |
| 1137 | Beinta av Reyni – Eminem a.k.a. Slim Shady | 21.600 |
| 1064 | Eyvindur Mohr – Hús | 8.000 |
| 1063 | Thomas Arge – Ross og fólk | 30.000 |
| 1153 | S. J. Mikines – Sjálvsmynd (1933) | 250.000 |
| 1152 | S. J. Mikines – Faðir mín (1934) | 150.000 |
| 1142 | Kári Svensson – Úr Mikinesi (náttúrulýsing) | 25.000 |
| 1144 | Anker Mortensen – Fákunnunarskýggj | 3.500 |
| 1145 | Anker Mortensen – Fákunnunarskýggj | 3.500 |
| 1146 | Anker Mortensen – Fákunnunarskýggj | 3.500 |
| 1147 | Marius Olsen – Mánalýsisnátt | 3.400 |
| 1149 | Marius Olsen – Maður og kona | 2.800 |
| 1148 | Marius Olsen – Kvøld | 3.400 |
| 1143 | Bjarne Werner – Samansøkking | 19.000 |
| | **Íalt** | **684.400** |

## Donatión - gáva:

**Listaverk:**

**Tróndur Patursson (1937).**
Sjónarringur 1972. Olja.
150 x 190 cm.
Inventarnr. 1035

**Gevari:**

Elinborg Trónd Johansen, Hoydalsvegur 7, Tórshavn
Hjørdis Trónd, Undir Pisuvarða 3, Tórshavn

## Latin okkum í varðveitslu:

Listaverk:
**Rannvá Mortensen (1950).**
Abstrakt / Non-figurativt
Listaverk í 7 pørtum 2006 Akryl.
Inventarnr. 1154

Latið okkum:

Listafelag Føroya

# Útlánt listaverk til almennu stovnarnar:

Almannaráðið
Arbeiðsloysisskipanina
Bileftirlit Føroya
Danmarkar
Deildina fyri Arbeiðs- og Almanna Heilsu
Familju- og Heilsumálaráðið
Ferðaráð Føroya
Fíggjarmálaráðið
Fiskimálaráðið
Fiskirannsóknarstovuna
Føroya Fólkaháskúla
Føroya Fornminnisavn
Føroya Gjaldstovu
Føroya Kærustovn
Føroya Landfúta
Føroya Landsskjalasavn
Føroysku Sendistovuna í Keypmannahavn
Fróðskaparsetur Føroya
Gamla Apotekið / Løgtingsskrivstovuna
Granskingarráðið
Hvíldarheimið Naina
Landsbanki Føroya
Landsgrannskoðaran
Landssjúkrahúsið (Røntgendeildina)
Landsverkfrøðingin
Løgtingsskrivstovuna
Menningarstovuna
Mentamálaráðið
Nærverkið
Oljumálaráðið
Postverk Føroya
Sjónvarp Føroya
Sorinskrivaran
Strandfaraskip Landsins
Tinganes
Tórshavnar Býráð
Tryggingarfelagið
Vinnuframagrunnin

# Varðveiting

Konservering

Fælleskonservering í Århus er samstarvsfelagi okkara í konserveringsmálum og í ár eru fylgjandi 21 verk konserverað fyri kr. 378.000.

| Inv.Nr. | Heiti | Listafólk |
|---|---|---|
| 448 | Bátadráttur | S-J Mikines |
| 207 | Gentumynd | S-J Mikines |
| 447 | Jesus á Genezeretvatn | S-J Mikines |
| 461 | Sjálvsmynd | S-J Mikines |
| 20 | Vár | S-J Mikines |
| 681 | Jørgen Jørgensen | S-J Mikines |
| 627 | Lysebu (akvarel) | S-J Mikines |
| 983 | Sjálvsmynd | S-J Mikines |
| 1119 | Lundar | William Gislander (svensk) |
| 666 | Grindadráp | S J-Mikines |
| 78 | Nólsoyar Kirkja | Steffan Danielsen |
| 42 | Gullfinnur við Bryggju | Jack Kampmann |
| 734 | Brim eysturi á Møl | Niels Kruse |
| 1120 | Mýrusóljur | Flora Heilmann |
| 1121 | Úr gomlu Havnini(Gl. Bókasavnið) | Christian Holm Jacobsen |
| 1123 | Úr gomlu Havnini | Christian Holm Jacobsen |
| 1126 | Hoyvíkin | Jógvan Waagstein |
| 336 | Havnin sæð úr Nólsoy | Steffan Danielsen |
| 1122 | Argir | Christian Holm Jacobsen |
| 205 | Tróndur Olsen á Malarenda | S J-Mikines |
| 1124 | Vestur um útferðina | Niels Kruse |
| | | |

## Upplatingartíðir – Opening hours

**1. mai - 31. august**
Týsdag / Tuesday – Fríggjadag / Friday kl. 11 – 16
Leygardag / Saturday – Sunnudag / Sunday kl. 14 – 17
Mánadag stongt – Monday closed

**1. september – 30. apríl**
Týsdag / Tuesday – Sunnudag / Sunday kl. 14 – 16
Mánadag stongt – Monday closed

Savnið er opið umleið 1300 tímar árliga.

## Framsýningar í Listasavni Føroya 2006

**13 jan. - 02 apr.**

### Mikines 100 ár.

Í sambandi við 100 ára føðingardag Mikinesar 23. februar varð skipað fyri minnisframsýning til heiðurs fyri henda fyrsta professionella føroyska listamálaran. Framsýningin var tematiskt sundurbýtt í andlitsmyndir, skitsur avaltartalvum, deyðsmyndir, grindadrápsmyndir, donsk myndevni og landslagsmyndir. Umframt hesar tilsamans 98 málningarnar vóru 7 størri fotomyndir at síggja saman við máliútgerð, DVD-filmi um Mikines og einari mynd av svianum Williami Gislander. Á sjálvum føðingardegnum varð skipað fyri serligum føðingardegi saman við Kára Mikines og Aðalsteinn Ingolfsson. Talan var ikki um eina søluframsýning. Vitjunartalið var omanfyri 6.000, og framsýningin sló tí undanfarna metið frá Munch-framsýningini.

**07 apr. - 06 mai.**

### Várframsýningin: Skipað av Felagnum Føroyskum Myndlistafólkum.

Árliga Várframsýningin varð hildin sum vant. 17 framsýnarar vóru:
Archibal Black, Aase Bømler Olsen, Pól Skarðenni, Ásla Rannvá Svensson, Anna Katrina Højgaard, Arnold Vegghamar, Jóhan Martin Christiansen, Astri Luihn, Bárður Dal-Christiansen, Kári Svensson, Sigrun Gunnarsdóttir Niclasen, Jógvan Biskopstø, Vígdis Petersen, Marianna Gjógvará, Eyðun av Reyni, Ole Wich og Amariel Norðoy.
Ole Wich hevði harumframt eina framførslu saman við Peturi Pólssyni 20. apríl. Talan var um eina søluframsýning við 48 verkum, harav 4 verk vórðu seld. Vitjanin var góð.

**12 mai - 04 jun.**

### Rethinking Nordic Colonialism:

**A Postcolonial Exhibition Project in Five Acts. NIFCA framsýning.**
Ein stórfingin norðurlendsk listaverkætlan varpaði ljós á norðurlendsku hjálandasøguna. Stovnur Norðurlanda fyri samtíðarlist, NIFCA, hevði tikið stig til hesa framlítandi verkætlan, sum flættaði framsýningar saman við listasmiðjur, ráðstevnur, hoyringar og tilburðarleik í Íslandi, Grønlandi, Føroyum og sámiska partinum av Finnlandi. 56 viðurkend listafólk, ástøðingar, politikarar og græsrótarfólk úr øllum heiminum vóru við í verkætlanini, sum vardi frá 24. mars til 25. novembur 2006. Listaverkætlanin var fyrsta royndin at skriva eina samlaða norðurlendska hjálandasøgu. Hon var fyrsta av sínum slagi í Norðulondum og var makaleys í vavi og sniði, tí hon setti listagreinir sum mynd- og videolist, film, performance, tónleik og atgerðarlist saman við metingum og politiskum ástøðum um eftirhjálandatíðina. Luttakandi listafólk í Listasavninum vóru:

Pia Arke (Grønland/Danmark), Nadiah Bamadhaj (Malaysia/Indonesia), Godfried Donkor (Ghana/Stóra Bretland), Jane Jin Kaisen (Suður Kora/Danmark) & Tobias Hübinette (Suður Korea/Svøríki), Rannvá Holm Mortensen (Føroyar) og Ruangrupa (Indonesia).
Talan var ikki um søluframsýning. Vitjanin var góð.

**09 jun. - 16 jul.**

## Summarframsýningin.

Fyri aðru ferð varð árliga Summarframsýningin hildin. Hesaferð vóru myndir hjá Listasavninum at síggja. Myndirnar vóru eftir Mikines, Ingálv av Reyni, Frimod Joensen, Janus Kamban og Thomas Arge. Talan var ikki um eina søluframsýning. Vitjanin var heilt góð, serliga tí nógv ferðafólk eru. Av tí sama var DVD-filmurin frá "Mikines 100 ár" framsýndur, so tey fingu høvi at síggja hann.

**28 jul. - 30 jul.**

## Ólavsøkuframsýningin. Skipað av Listafelagi Føroya.

Árliga Ólavsøkuframsýningin varð hildin sum vant. 19 framsýnarar vóru:
Jóhan Martin Christiansen, Marianna Mørkøre, Brynjolfur á Heygum, Øssur Mohr, Arngerð Lamont Joensen, Bárður Oskarsson, Ole Wich, Beinta Festirstein, Jóna Rasmussen, Finleif Mortensen, Philippe Carré, Arnold Vegghamar, Jógvan Biskopstø, Marianne Gjovaraa, Kári Svensson, Ásla Rannvá Svensson, Amariel Norðoy, Erik Haagemann og Óluva Jóhannesen.
Talan var um eina søluframsýning við 47 verkum, harav 14 verk vórðu seld. Eini 1050 gjaldandi fólk komu á vitjan, og var tað í mun til hækkað atgongugjald (frá 30 kr. til 40 kr.) og styttri framsýningardagar (frá 4 døgum til 3 dagar) á somu leið sum í fjør.

**05 aug. - 24 sep.**

## Endurnýggjað íslendsk málningalist:

**Odd Nerdrum, Kristin Gunlaugsdóttir, Georg Gudni Hauksson, Karolina Laurusdóttir og Steffan Boulter.**
Talan var um eina sera forvitnisliga søluframsýning við fimm íslendingum, ið øll vóru meiri ella minni altjóða viðurkend, serliga Odd Nerdrum, hvørs fýra málningar høvdu eitt samanlagt virði á 9 mió. NOK. Ætlanin við hesi framsýning var at sýna fram íslendska málningalist og greiða frá henni, soleiðis at vitjandi fáa eina góða fatan av, hvar íslendsk málningalist flýtur. Til hetta varð eisini bók útgivin, ið nærri greiddi frá listafólkunum og íslendskari málningalist. Til ferniseringina var ætlanin, at øll fimm listafólkini skuldu vera til staðar, men orsakað av veðri, var bert Stefán Boulter til staðar, tí hann kom nakrar dagar frammanundan. 20 verk vóru við. Vitjanin hevur verið góð. Framsýningin fekk umrøðu í mongum tíðindabløðum uttanlands.

**29 sep. - 22 okt.**

## Jón Laxdal (Aukureyri, Iceland). Serframsýning.

Søluframsýning við íslendaranum Jón Laxdal. Á framsýningini vóru í høvuðsheitum límmyndir (kollagur) samansettar av prentaðum teksti, bókstavum, prýðislutum og fotomyndum. Framsýningin hevði áður verið sýnd á trimum støðum í Íslandi og í Berlin. Bók var útgivin í hesum sambandi. Jón Laxdal var til staðar til ferniseringina. Nú summarið, ið annars hevði borið ótruliga mong vitjandi við sær, var av álvara farið at halla, merktist hetta eisini á vitjunartalið, men kortini var tað á góðari leið.

**28 okt. - 18 des.**

## Provincialists:

**Ane Lan (Norway), Þórdís Alda Sigurðardóttir (Iceland),**
**Madeleine Park (Sweden), Astri Luihn (Faroe Islands).**
Seinasta framsýningin í árinum, ið var ein framsýning, ið ferðaðst víðari til Íslands, Noregs, USA og Miðevropa, var við fýra norðurlendingum, sum í sambandi við framsýningina eisini skipaðu fyri seminari á

Fróðskaparsetrinum. Dentur varð lagdur á tað provinsiella, t.e. tað ikki-stórbýarliga (non-urbanska), ið varð umrøtt, og lagt varð upp til kjak um hugtakið. Á framsýningini vóru málningar, installatiónir og video, sum høvdu tað í felag, at tey vóru skapt í einum útjaðara. Listfrøðingurin Inger Lena Gaasemyr samskipaði framsýningina og lat hana upp. Tey fýra listafólkini vóru við til ferniseringina. Vitjanin var á heilt góðari leið.

## Vitjandi, rundvísingar og annað kunnandi virksemi

Tað hava verið 15.895 vitjandi; av hesum eru skúlar, børn o.t. um 6.162 vitjandi.

Nógvar rundvísingar hava verið fyri felagsskapir, ferðafólkabólkar, skúlar, útlendskar gestir hjá landsstýrinum og løgtinginum og øðrum, bæði í vanligu upplatingartíðini og eisini fyri og eftir vanliga upplatingartíð.

# Bygnaður, leiðsla og starvsfólk

## Stýrið

Savnið hevur eitt stýri við 4 limum.
Mentamálaráðharrin velur ein lim, sum er formaður, og Tórshavnar Kommuna, Listafelag Føroya og Føroysk Myndlistafólk velja hvør sín lim. Fyri hvønn limin verður samstundis valdur ein tiltakslimur. Nevndin verður vald fyri eitt 4-ára skeið. Valskeiðið gongur frá 1. apríl til 31. mars eftir kommunuval.
Stýrið velur varaformann. Fær formaðurin forfall, tekur varaformaðurin formanssætið.

Niðanfyri vórðu vald í stýrið fyri eitt 4 ára skeið frá 1. apríl 2005 til 31. mars 2009.

Formaður: Jágvan Páll Lassen, valdur av Mentamálaráðharranum - Einar Waag, varalimur

Nevndarlimur: Hildur Eyðunsdóttir, vald av Tórshavnar Kommunu – Katrin Dahl Jacobsen, varalimur.

Nevndarlimur: Árni Winther, valdur av Listafelagi Føroya – Julianna Klett, varalimur

Nevndarlimur: Sigrun Gunnarsdóttir Niclassen, vald av Føroysk Myndlistafólk – Astri Luihn, varalimur

### Leiðslan

Helgi Fossádal, savnsleiðari.

## Savnsfólk

Mortan Ólason Vang er settur í starv sum savnsvørður. Mortan er 26 ára gamal og er útbúgvin BA í Føroyskum og verður MA í heyst 2007.

### Leys hjálparfólk

Eftiransingarfólk: Helga Nattestad, Jónvá Danielsen og Jóhan Martin Christiansen

# Fígging og roknskapur

Listasavn Føroya verður rikið við studningi á løgtingsfíggjarlógini, Tórshavnar Kommunu og kann eisini taka ímóti øðrum stuðli, veitingum og gávum. Harafturat kunnu takast atgongu- og leigugjøld, kantinurakstur og søla av lutum og øðrum, sum hava samband við virki savnsins.

## RAKSTRARROKNSKAPUR

| | | 2006 | (t.kr.) *2005* |
|---|---|---|---|
| **Mentanartiltøk:** | | | |
| Atgongugjald | | 255.692 | *194* |
| Myndasøla | | 78.330 | *114* |
| Framsýningarútreiðslur | | -83.889 | *-388* |
| | | **250.133** | ***-80*** |
| **Avgreiðsla, móttøka:** | | | |
| Søla | | 327.794 | *228* |
| Keyp | | -35.767 | *-45* |
| Goymslubroyting | | 158.690 | *0* |
| | | **450.717** | ***183*** |
| **Aðrar inntøkur:** | | | |
| Stuðul | 1 | 460.000 | *380* |
| Leiguinntøkur frá grafiska verkstaðnum og leiðara verkstaðsins | | 48.000 | *48* |
| Leiguinntøkur, grannahúsini | | 92.400 | *108* |
| Leiguinntøkur málningar o.a. | 2 | 327.755 | *196* |
| Aðrar inntøkur | | 48.145 | *0* |
| | | **976.300** | ***732*** |
| **Úrslit av aktivitetum v.m.** | | **1.677.150** | ***834*** |
| **Útreiðslur:** | | | |
| Listakeyp | 4 | -684.400 | *-47* |
| Konservering | | 0 | *-58* |
| Viðlíkahald, reingerð v.m. | | -3.008 | *-1* |
| Tryggingarendurgjald fyri herverk og innbrot í 2004 | | 0 | *58* |
| Skrivstovuhald, porto v.m. | | -30.817 | *-27* |
| Ferðaútreiðslur og umboðan | | -126.112 | *-48* |
| Annað | | -21.084 | *-66* |
| | | **-865.421** | ***-189*** |
| **Úrslit áðrenn fíggjarligar postar** | | **811.729** | ***645*** |
| Rentuútreiðslur | | -28 | *0* |
| Rentuinntøkur | | 777 | *1* |
| | | **749** | ***1*** |
| **Ársúrslit** | | **812.478** | ***645*** |

**Stýrið mælir til, at ársúrslitið verður býtt soleiðis**:

| | | | |
|---|---|---|---|
| At flyta til næsta ár | | 45.478 | *10* |
| At flyta til millumverandi við Føroya Gjaldstovu | | 767.000 | *635* |
| | | **812.478** | ***645*** |

## FÍGGJARSTØÐA PR. 31. DESEMBER

| AKTIV | | 2006 | *(t.kr.)* *2005* |
|---|---|---|---|
| Málningar | 3 | 16.334.375 | *15.650* |
| Innbúgv | | 295.354 | *295* |
| Listaskálin, 1994 | | 18.614.367 | *18.615* |
| | | **35.244.096** | ***34.560*** |
| Bygningur, matr. nr. 1265v, Tórshavn | | **899.800** | ***900*** |
| **STØÐISOGN ÍALT** | | **36.143.896** | ***35.459*** |
| Kassapeningur | | 15.568 | *3* |
| Postgiro | | 906 | *2* |
| Føroya Banki | | 643.785 | *406* |
| Eik Banki | | 288 | *85* |
| **Tøkur peningur íalt** | | **660.547** | ***496*** |
| **Goymsla** | | **358.690** | ***200*** |
| Skuldarar | | 134.658 | *283* |
| **Áogn íalt** | | **134.658** | ***283*** |
| **OGN Í UMFERÐ ÍALT** | | **1.153.895** | ***979*** |
| **AKTIV ÍALT** | | **37.297.791** | ***36.439*** |

**Veðseting:**

Matr. nr. 1265v, Tórshavn:

| | |
|---|---|
| Eik Banki | 641.978 |
| Eik Banki | 800.000 |
| | **1.441.978** |

# FÍGGJARSTØÐA PR. 31. DESEMBER

| PASSIV | Nota | 2006 | (t.kr.) *2005* |
|---|---|---|---|
| Saldo primo |  | 35.481.348 | *35.288* |
| Keyp av listaverkum í árinum |  | 684.400 | *47* |
| Føroya Gjaldstova, avdráttir |  | 75.204 | *136* |
| Flutt frá rakstri |  | 45.476 | *10* |
| **Eginogn ultimo** |  | **36.286.428** | ***35.481*** |
| | | | |
| **Lán viðv. matr. nr. 1265v í Tórshavn:** | | | |
| Eik Banki 267.584.8 |  | 10.526 | *94* |
| Eik Banki 281.933.5 |  | 364.827 | *441* |
| **Lán íalt** |  | **375.353** | ***535*** |
| | | | |
| Føroya Gjaldstova (vegna ársúrslit) | 5 | 332.000 | *400* |
| Ognarar |  | 299.200 | *1* |
| Onnur skuld |  | 4.810 | *21* |
| **Skuld íalt** |  | **636.010** | ***422*** |
| | | | |
| **PASSIV ÍALT** |  | **37.297.791** | ***36.439*** |

# NOTUR TIL ÁRSROKNSKAPIN

| | 2006 | *(t.kr.)* *2005* |
|---|---:|---:|
| **1. Stuðul** | | |
| **Framsýningar:** | | |
| Norðurlandahúsið | 0 | *20* |
| Tórshavnar Kommuna | 0 | *7* |
| Eik Banki | 0 | *10* |
| Mentunargrunnur landsins | 12.000 | *75* |
| Mentamálaráðið | 35.000 | *0* |
| **Konservering og myndakeyp:** | | |
| Mentamálaráðið | 88.000 | *110* |
| Augustinusfonden | 75.000 | *0* |
| Beckettfonden | 25.000 | *0* |
| Ny-Carlsbergfonden | 75.000 | *0* |
| **Árligur stuðul:** | | |
| Tórshavnar býráð | 150.000 | *150* |
| **Annar stuðul:** | | |
| Mentamálaráðið - ferðastuðul | 0 | *8* |
| **Stuðul íalt** | **460.000** | ***380*** |

| | 2006 | 2005 |
|---|---:|---:|
| **2. Leiguinntøkur málningar o.a.** | | |
| Leiga Skálin til tiltøk | 0 | *13* |
| Leiga til móttøkur o.l. | 67.855 | *27* |
| Leiga – List og málningar | 259.900 | *156* |
| **Leiguinntøkur íalt** | **327.755** | ***196*** |

| | 2006 | 2005 |
|---|---:|---:|
| **3. Málningar** | | |
| Saldo primo | 15.649.975 | *15.603* |
| Keypt í árinum | 684.400 | *47* |
| **Saldo ultimo** | **16.334.375** | ***15.650*** |

**4.** **Keypt í árinum:**

| Inv. nr.: | Listafólk: | Prísur: |
|---|---|---|
| 955 | Øssur Johannesen – Fullmáni | 5.000 |
| 1131 | Jógvan Asbjørn Skaale – Kvinna | 4.500 |
| 2105 | Eyðun av Reyni – Stormdag | 25.200 |
| 1136 | Astri Luihn – The Quest of the Dragon Slayer | 36.000 |
| 1135 | Jóna Rasmussen – Dialog A og B | 7.200 |
| 1139 | Arnold Vegghamar – Klippevæg | 10.800 |
| 1141 | Arnold Vegghamar – Østvig | 10.800 |
| 1140 | Arnold Vegghamar – Østvig | 9.900 |
| 1138 | Amariel Norðoy – Fiskerbørn | 30.600 |
| 1132 | Sigrun Gunnarsdóttir – Søndagsfrakken | 6.750 |
| 1133 | Sigrun Gunnarsdóttir – Søndagsfrakken | 7.200 |
| 1134 | Sigrun Gunnarsdóttir – Søndagsfrakken | 6.750 |
| 1137 | Beinta av Reyni – Eminem a.k.a. Slim Shady | 21.600 |
| 1064 | Eyvindur Mohr – Hús | 8.000 |
| 1063 | Thomas Arge – Ross og fólk | 30.000 |
| 1153 | S. J. Mikines – Sjálvsmynd (1933) | 250.000 |
| 1152 | S. J. Mikines – Faðir mín (1934) | 150.000 |
| 1142 | Kári Svensson – Úr Mikinesi (náttúrulýsing) | 25.000 |
| 1144 | Anker Mortensen – Fákunnunarskýggj | 3.500 |
| 1145 | Anker Mortensen – Fákunnunarskýggj | 3.500 |
| 1146 | Anker Mortensen – Fákunnunarskýggj | 3.500 |
| 1147 | Marius Olsen – Mánalýsisnátt | 3.400 |
| 1149 | Marius Olsen – Maður og kona | 2.800 |
| 1148 | Marius Olsen – Kvøld | 3.400 |
| 1143 | Bjarne Werner – Samansøkking | 19.000 |
| | **Íalt** | **684.400** |

**5. Føroya Gjaldstova**

| | | |
|---|---|---|
| Saldo primo | 400.000 | *415* |
| Flutt úrslit | 767.000 | *635* |
| Goldið í árinum | -835.000 | *-650* |
| **Saldo ultimo** | **332.000** | ***400*** |

# Samanseting av almenna og sjálvseigandi ársroknskapunum

Samanseting av almenna og sjálvseigandi ársroknskapunum **2006**

| | Sjálvseigandi | Almennur | Samlað |
|---|---|---|---|
| **Mentunartiltøk:** | | | |
| Atgongugjald | 255.692 | 0 | 255.692 |
| Myndasøla | 78.330 | 0 | 78.330 |
| Framsýningarútreiðslur | -83.889 | -133.296 | -217.185 |
| | **250.133** | **-133.296** | **116.837** |
| **Avgreiðsla, móttøka:** | | | |
| Søla | 327.794 | 0 | 327.794 |
| Keyp | -35.767 | -154.575 | -190.342 |
| Goymslubroyting | 158.690 | 0 | 158.690 |
| | **450.717** | **-154.575** | **296.142** |
| **Grafiskur verkstaður:** | | | |
| Leiguinntøkur grafiskur verkstaður | 48.000 | 0 | 48.000 |
| Útreiðslur grafiskur verkstaður | 0 | 0 | 0 |
| | **48.000** | **0** | **48.000** |
| **Úrslit av aktivitetum v.m.** | **748.850** | **-287.871** | **460.979** |
| **Aðrar inntøkur:** | | | |
| Stuðul/Játtan | 460.000 | 1.981.985 | 2.441.985 |
| Leiguinntøkur grannahúsini | 92.400 | 0 | 92.400 |
| Leiguinntøkur list | 259.900 | 0 | 259.900 |
| Leiga til receptiónir | 67.855 | 0 | 67.855 |
| Leiga Skálan út til tiltøk | 0 | 0 | 0 |
| Aðrar inntøkur | 48.145 | 0 | 48.145 |
| | **928.300** | **1.981.985** | **2.910.285** |
| **Fyrisitingarútreiðslur:** | | | |
| Fast lønt íroknað eftirløn | 0 | -658.971 | -658.971 |
| Tímalønt | 0 | -248.882 | -248.882 |
| Samsýningar, viðbøtur og arb.gjøld v.m. | 0 | -29.512 | -29.512 |
| Sakkøn hjálp | 0 | -124.880 | -124.880 |
| El-útreiðslur | 0 | -88.465 | -88.465 |
| Hitaútreiðslur | 0 | -157.875 | -157.875 |
| Telefon | 0 | -41.067 | -41.067 |
| Edv v.m. | 0 | -53.045 | -53.045 |
| Roknskaparhjálp, grannskoðan og onnur sakkøn hjálp | 0 | -29.500 | -29.500 |
| Trygging | 0 | -122.933 | -122.933 |
| Vaktartænasta | 0 | -20.945 | -20.945 |
| Viðlíkahald, reingerð v.m. | -3.008 | -151.915 | -154.923 |
| Flutningur | 0 | -167.371 | -167.371 |
| Skrivstovuhald, porto v.m. | -30.817 | -48.842 | -79.659 |
| Lýsingar og undirhald v.m. | 0 | -31.276 | -31.276 |
| Keyp av smáamboðum og innbúgv | 0 | -733 | -733 |
| Ferðaútreiðslur og umboðan | -126.112 | 0 | -126.112 |
| Annað | -21.084 | -4.902 | -25.986 |
| | **-181.021** | **-1.981.114** | **-2.162.135** |
| **Aðrar útreiðslur:** | | | |
| Konservering | 0 | -378.000 | -378.000 |
| Listakeyp | -684.400 | 0 | -684.400 |
| | **-684.400** | **-378.000** | **-1.062.400** |
| **Úrslit áðrenn fíggjarligar postar** | **811.729** | **-665.000** | **146.729** |
| Fíggjarligar inntøkur | 777 | 0 | 777 |
| Fíggjarligar útreiðslur | -28 | 0 | -28 |
| | **749** | **0** | **749** |
| **Úrslit** | **812.478** | **-665.000** | **147.478** |
| partur av úrsliti flutt frá sjálvseigandi til almenna uppgerð | -767.000 | 767.000 | |
| Lánsgjøld | 0 | -102.000 | |
| | **45.478** | **0** | |

Uppskot til ársfrágreiðingina er løgd fyri stýrið á Listasavni Føroya

Tórshavn, 31. 05 2007

**Helgi Fossádal**